# Flogbreyt í Klovanum skilagóð



*Teldugjørd mynd av nýggjari flogbreyt í Klovanum. Vit síggj Sørvágsvatn øðrumegin og Fjallavatn hinumegin*

*Mynd Munin*

**- Latið okkum læra av fortíðini og ikki gera skeivar og dupultíløgur. Eitt grótbrot í Klovanum, sum skal útvega grót til longjan av verandi vølli, vil samtíðis geva eina ómetliga synergiieffekt, soleiðis at tað tá verður skapt grundarlag fyri eini alternativari flogbreyt um somu tíð heldur stjórin í ráðgevarafyritøkuni Munin, Bogi Jacobsen**

FLOGVALLAROYGGIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Sørvágs kommunu heitti fyri tíð síðani á ráðgevarafyritøkuna Munin um at gera kanningar í sambandi við uppskotið at gera nýggja flogbreyt í Klovnum, dalurin, sum gongur inn í oynna frá Vatnsoyrum. Bogi Jacobsen er stjóri í ráðgevarafyritøkuni Munin.

Vit spurdu hann um tað ber til at sannføra politikarar og onnur um, at alternativ flogbreyt í Klovanum í Vágum er tann besta loysnin í flogvallarmálinum?

- Tað er nokk ein stór uppgáva at kunna prógva og dokumentera út frá tí vitan vit hava nú. Tann orka, sum Sørvágs kommuna og Munin hava lagt í hetta higartil er gjørt uppá stutta tíð, og tað fyriliggur ikki nakar statistikkur um vind aftanfyri, tá man tosar um, at man skal kanna hetta niður í æsir. Vit hava havt samband við donsku ráðgevarafyritøkuna Rambøll, og Verkfrøðingastovan og Munin eru farin saman um at hyggja nærri at hesum viðurskiftunum, har vit hava hugt eftir teimum krøvum, sum verða sett einum altjóða flogvølli. Tað er ein frágreiðing, sum eitur Anex 14, og har standa m.a. øll tey geometrisku krøvini, sum skulu vera gingin á møti rundan um ein vøll. Vit, sum fyritøka hava at leggja okkum eftir at hava stýr uppá at visualisera í 3D, og vit hava so gjørt sokallaðar upstructionsflatur, sum eru forðingarflatur og lagt tað inn á Vágoynna og inn yvir økið Klovin. Vit hava so fingið verkfrøðingar hjá Rambøll at hyggja eftir hugskotinum, og tað sær út til, at øll krøvini meira ella minni eru uppfylt.

## Synergiir

Tað sær út til, at man kann flúgva inn á vøllin sunnanífrá og sleppa burtur sunnanífrá, og norðanífrá eru eisini møguleikar at fara út yvir Fjallavatn. Dalurin er so mikið breiður, at tey krøvini, ið verða sett, kunnu uppfyllast við at leggja vøllin niðan í Klovan. Synergiieffektin við at leggja eina hjábreyt er í prinsippinum sera einføld. Tað snýr seg um at gera ein øgiliga stóran veg og at hava ein veg, ein taxaveg frá tí vøllinum oman til teir verandi fasilitetirnar á verandi vølli, tvs. at tann útbyggingin, sum skal gerast, her hugsi eg um tær 365 mill. kr., sum eru settar av til útbygging av verandi floghavn, har hava vit hjá Munin tosað um nakrar praktiskar loysnir. Hesar snúgva seg um, hvar man skal leggja grótbrotið, og hvar fær man tilfar til útbygging av verandi vølli, sum er tað týdningarmesta her og nú, og sum størst trýst er á at fáa gjørt.

Bogi Jacobsen vísir á, at synergieffektin við at leggja grótbrotið uppi í Klovanum og leggja grótbrotið geometriskt soleiðis, at tað lýkur krøvini til eina



*Verður flogbreyt gjørd í Klovanum, verður óneyðugt við øðrum fasilitetum. Taxavegur verður gjørdur til verandi floghavn framvið Vatnsoyrum*